

*Zacharias Wang beyð írsku gestunum vælkomnum, og í vælkomstrøðuni segði hann, at írar og føroyingar høvdu nógv felags. Hann nevndi m. a., at bæði írar og føroyingar høvdu í nógv ár verið kúgað fólkasløg, men høvdu strítt seg úr kúgingini. Síðani komu írarnir á pallin, og teir blivu stórliga fagnaðir av mannamúgvuni. Á myndini síggja vit Barney McKenna við mandolinini*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Írsku abbarnir vóru framúr

*Hóast teir eru komnir væl upp í aldur, og bæði hár og skegg er farið at hvítna, so er eingin ivi um, at The Dubliners er ein tónleikabólkur, sum kann fáa bæði ung og gomul upp á gólvið. Hetta prógvaðu teir í Ítróttarhøllini á Hálsi leygarkvøldið*

Terji Nielsen

Eini 1.300 fólk vóru komin saman í høllini á Hálsi leygarkvøldið fyri at hoyra teir víðagitnu írsku abbarnar, The Dubliners, framføra sín vælkenda glaða írska fólkatónleik. Áhoyrararnir vóru í øllum aldri; tann yngsti helst um tey sjey árini, og tann elsti mundi vera farin um tey áttati.

### Byrjaðu stundisliga

Tiltakið í høllini á Hálsi leygarkvøldið var sett til at byrja klokkan átta, og ikki kann sigast annað, enn at fyrireikararnir hildu tíðarætlanina væl. Klokkan var ikki meiri enn farin av átta, tá ið ein føroyskur bólkur, ið var mannaður við nøkrum av teimum royndastu heimligu tónleikarunum innan dansitónleik, trein á pallin. Bólkurin dugdi einastandandi væl at fáa lív í áhoyrarafjøldina, og tá ið teir høvdu spælt í okkurt um ein tíma, og dansurin gekk upp á tað besta, var tíðin komin til at fáa The Dubliners á pallin.

Áðrenn írarnir komu á pallin, bjóða samfelagsfrøðingurin, Zacharias Wang, teimum vælkomnum, og hann segði í stuttu vælkomstrøðu sínari, at írar og føroyingar høvdu nógv til felags. Hann nevndi millum annað, at bæði írar og føroyingar høvdu í nógv ár verið kúgað fólkasløg, men høvdu strítt seg úr kúgingini. Síðani komu írarnir á pallin, og teir blivu stórliga fagnaðir av mannamúgvuni.

### Eru ikki ungir longur

Tað var beinan vegin, at glaði tónleikurin hjá The Dubliners hevði fingið so at siga hvørja sál at reisa seg úr áhoyrarasessinum, og stóðst tú væl fyri, kundi tú eygleiða, hvussu øll áhoyrarafjøldin livdi við í tónleikinum.

Tíverri var ljóðgóðskan ikki av tí besta fyrstu løtuna, men aftaná tey fyrstu trý løgini var hetta fingið í rættlag.



*Írsku Sankta Frans systrarnar, Maria og Cecilia vóru og lýddu á landsmenninar*



*Gott lív var í gomlu knarkunum leygarkvøldið…*

**Myndir: Jens Kristian Vang**





*John Sheahan á violin og Eamon Campbell gittar*

Teir fimm limirnir í The Dubliners eru heldur ikki nakrir unglingar longur. Allir hava teir annaðhvørt grátt ella heilt hvítt hár og skegg, og onkur einkultur av teimum er eisini eitt sindur lamin. Somulei0is vildi onkur vera við, at ein av írsku tónleikarunum var rættuliga deyvur, so at ljóðið í pallhátalaranum hjá honum noyddist at vera rættuliga hart frá, og hetta órógvaði teknikkin nakað.

Hóast teir allir eru komnir væl upp í aldur, er spæligleðin hjá teimum tó hin sama. Tað hoyrdist týðuliga, at teir elska at spæla sín tónleik, og sum áhoyrari merkti tú, at her l1 nakað aftan fyri tónleikin. Við nýmótans tónleikinum er tað mangan so, at tú hevur tað kenslu, at tónleikurin bara er gjørdur fyri at vinna sær pening, men hetta kann ikki sigast um The Dubliners. At teir fimm írarnir fingu sær eina hvíld, tá ið teir høvdu spælt í okkurt um ein tíma, tóktist heldur ikki til at ávirka lagið á áhoyrarunum, sum nú eisini fingu høvi til at hvíla seg eina løtu.

### Lagið var í topp

Tað var eingin ivi um, at lagið var í topp hjá teimum mongu áhoyrarunum í høllini á Hálsi leygarkvøldið. Ymsastaðnis í høllini dansaðu fólk, og hýrurin var óførur. Serliga var tað banjoin hjá Barney McKenna, ið var vældámd, og tað var ógvuliga hugtakandi at síggja, hvussu fingrarnir hjá honum spældu við streingirnar á banjoini. Nakað, sum teir flestu av áhoyrarunum ikki vistu, var, at Barney McKenna bert hevur The Dubliners sum eitt ítriv, tí at hann eigur ein kraftblokkabát, sum hann gongur ógvuliga høgt uppí.

Eisini var violinin hjá John Shean ógvuliga væl dámd millum áhoyrararnar, eins og djúpa bassrøddin hjá Amon Campbell fekk tað at renna tær kalt niður eftir rygginum.

At tað ikki bert vóru tey lívligu løgini hjá írunum, sum áhoyrararnir livdu seg inní, sást millum annað, tá ið tað kenda stilla lagið „the town I love so much“ bleiv spældur, tí tá sóust tendrarar lýsa um alla høllini

Tá ið so allarkendasta lagið hjá bólkinum, nevnliga tað navnframa lagið “Whiskey in the jar”, tóktist rómurin á áhoyrarafjøldina ongan enda at fáa. Allir áhoyrararnir reistust úr sessinum hjá sær, og øll sungu við. Hetta lagið hevur enn tann dag í dag stóran tokka millum øll ættarlið, og tað er ikki langt síðani, at ein av teimum allarbest umtóktu bólkinum í heiminum millum ungfólk, Metallica, innspældi teirra egnu útgávu av “Whiskey in the jar”.

Aftaná hetta lagið takkaðu írarnir fyri seg, men áhoyrarafjøldin vildi ikki rættuliga sleppa teimum, og teir noyddust tí út aftur á pallin at geva okkurt eykalag. Tá spældu teir eitt nú tað í Føroyum so kenda veitslulagið “Wild Rover”, og tá sang øll høllin við. Síðani var konsertin komin at enda, og øll fóru vælhýrd heim aftur ella víðari í býin, meðan hjálparfólkini fóru at rudda upp eftir konsertina.

### Okkurt var ov langdrigið

Hóast konsertin var framúr góð, og allir áhoyrararnir vóru stak væl nøgdir, so var tað tó okkurt, ið kanska kundi verið betur. Til dømis var, sum áðurnevnt, ljóðið ikki av tí besta tað fyrstu løtuna, og tískil fingu The Dubliners ikki bestu byrjanina upp á konsertina.

Eisini vóru tónleikainnsløgina hjá írunum, har teir løgdu dentin á eitt ljóðføri, kanska í longra lagi. Ikki tí, violinspælið hjá John Shean er hugtakandi, men at hoyra hann spæla solo í 10 minuttir, kann gerast ov langdrigið. Eisini var soloinnslagið hjá Barney McKenna nakað langt.

Hinvegin vóru karmarnir um konsertina góðir. Stólar vóru settir upp úti í síðunum av høllini, meðan tað framman fyri pallin var opið gólvpláss, har man kundi dansa ella bara standa og lurta. Tað sást týðuligani, at tað serliga vóru teir yngru áhoyrararnir, sum høvdu troðkað seg fram at pallinum, og har var veruligt lív í, og onkur av írsku abbunum fór eisini heilt út á kantin á pallinum og fekk sær ein lítlan frá onkrum áhoyrara.

Eingir trupulleikar vóru við ófriði, og tað vísir seg, at til slíkar konsertir, har áhoyrarafjøldin er eitt sindur tilkomin, eru eingir trupulleikar.

Konsertin var sum heild sera góð, og tað er lítið at ivast í, at tey allarflestu, sum vóru í høllini leygarkvøldið, heldur enn fegin høvdu farið niðan aftur at lurta eftir teimum. The Dubliners vóru undir øllum umstøðum sinnaðir til at koma aftur til Føroya.

# Sungið og spælt í 38 ár

*Veðrið var ikki av tí besta tá ið flogfarið við Dubliners setti seg í Vágum fríggjakvøldið*

Orð og Mynd
Jonhard Hammer

Tað er fríggjakvøld Klokkan nærkast sjey, staðið er Hotel Føroyar. Veðrið er sera ringt, vátaslettingur og nógv regn. What a terible wheater, sigur guitarspælarin Eamonn Campel, og regni rennur niður eftir skegginum.

Fyrireikarnir av Dubliners konsertini hava bjóða til tíðindafund. Tað vóru ikki nógv fólk møtt upp, men vit fingu eitt prát við John Sheahan. Tað eru bara hann og Barney Mc Kenna, sum hava spælt við Dubliners síðani teir byrjaðu fyri 38 árum síðani. Søgan aftanfyri Dubliners er, at tað vóru nakrir ungir dreingir í Dublin, sum byrjaðu at spæla saman á einari Pub. Í 1967 fingu teir teirra veruliga fyrsta hit, tað var sangurin „Seven drunken Nights“ aftaná henda sangin, kom verðulig ferð á leiðin, gekk til Albert Hall í London og síðani hevur verið boð eftir teimun at spæla runt um allan heimin sigur John Sheahan.

### Føroyar er eitt deiligt land

Hetta er triðu fer at Dubliners eru í Føroyum. Ørsøkin til at teir koma aftur er, at teir dáma sera væl Føroyar og fólkið sum býr her, sigur John Sheahan. Hann sigur víðari, at tá ið vit fortelja fólkið at vit fara til Føroya at spæla, so veit næstan ongin hvar Føroyar eru. Vit føla okkum at verða sera hepnar at sleppa til Føroya at spæla og vónandi verður hetta ikki sístu ferð at vit seta okkara bein á hesar vøkru regnutu oyggjar.

### Dáma ikki Metalica

Nógvir av sangunum sum Dubliners hava gjørt eru vorðin stór hit. Tað eru nógvir bólkar, sum spæla sangir hjá teimun, og nakrir hava eisini givið teir út. Amerikanski bólkurin Metalica endurspældi herfyri sangin „Wicky in the jare“. Hetta bleiv eitt stórt hitt. Teir komu uppá flestu hitt listar runt í heiminum, og teir tjentu ikki so lítið uppá henda sangin. Sjálvt um hesin sangur var væl umtóktur millum manna, so halda teir í Dubliners at sangurin hjá Metalica ikki var nakað at reypa av. Vit hava einki ímóti at aðrir bólkar endurinnspæla okkara sangir, men hatta var bara ikki gott nokk, sigur tann sera frintligi John Sheahan.

### A pub Whit no Beer

At hava eina ølstovu uttan eina øl riggar ikki, syngja teir í Dubliners um. Tá ið teir frættu at tað bleiv ein konsert, har tað ikki var loyvið at selja øl, gjørdust teir sera kløkkir. Og vildu hava eina forkláring hvussu tað bar til. Teir forstóðu at her var ikki nógv at gera við hetta, men teir vildu senda eina heilsan til Finboga Arge landsstýrismann, sum hevur rúsdrekka mál um hendi. Fólkatónleikur og øl hoyra saman, tað skal sjálvandi verða við máta men onga øl á einari konsert tað riggar ikki sigur John Sheahan skemtandi.



*John Sheahan*